LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Hetta skylda vit okkara eldru



Val X
HEÐIN MORTENSEN
valevni Javnaðarfloksins
www.hedinmortensen.com

Tað eru tey eldru, sum hava lagt lunnar undir samfelagið, og tí skylda vit teimum ordiligar umstøður og sømiliga røkt. Eldraøkið skríggjar eftir loysnum, tí tørvurin er so stórur, og tí ber ikki til at bíða longur. Nú má landið gera nakað fyri at betra um umstøðurnar hjá okkara eldru.

Sum eg havi nevnt áður, er eldraøkið eitt hitt fremsta hjartamálið hjá mær, sum eg av øllum alvi vil arbeiða fyri at fáa loyst, so umstøðurnar verða betri. Tað tykist, sum eru umstøðurnar hjá okkara eldru druknaðar í øllum møguligum og ómøguligum málum í hesum valstríðnum, men tað er neyðugt, at vit varpa ljóskastaran á eldraøkið.

Ikki minst í Suðurstreymoy er ein ovurhonds stórur tørvur á plássum til eldri á bæði ellis- og røktarheimum, og langur bíðilisti er eftir at fáa eitt pláss, tá okkurt er. Tórshavnar kommuna hevur gjørt alt, sum er í hennara valdi, at bøta um umstøðurnar, men synd er at siga, at landið hevur verið til ta stóru nyttuna.

Vit kunnu fegnast um, at vit so seint sum í desember kundu taka í nýtslu nýggja røktarheimið á Tjarnargarði, ið gevur pláss fyri 24 fólkum aftur at teimum 10, ið vóru har frammanundan. Men samstundis er tað grátiligt, at landið ikki enn hevur fingið eyguni upp fyri tørvinum, ið er. Her krevjast ítøkiligar loysnir á borðið, so ellis- og røktarheimstørvurin verður loystur.

Landið má og skal vera ein aktivur spælari í øllum hesum, so vit kunnu geva okkara eldru virðiligar karmar um ellisárini, samstundis sum teirra avvarðandi kunnu kenna seg trygg við, at umstøðurnar hjá teirra eru góðar. Tey neyðarróp, vit dagliga hoyra hesum viðvíkjandi, koma bæði frá teimum eldru sjálvum, men ikki minst frá teirra avvarðandi, ið ikki vita sær síni livandi ráð.

Á tingi vil eg stríðast av øllum alvi fyri, at vit bæði fáa ellisheim, røktarheim, umlættingarheim og eldrasambýli í Suðurstreymoy, tí núverandi umstøður kann eingin bjóða fólki. Tey eldru, ið ynskja at vera heima og kunnu vera tað, skulu heldur ikki forsømast, tí har er alneyðugt at styrkja um leiklutin hjá Nærverkinum, ið hjá mongum kanska er einasta dagliga vitjan á gátt.

Starvsfólkini í Nærverkinum gera eitt veldugt arbeiði, men tey eru bara ov fáment. Vit eiga at seta fleiri fólk í starv, so tey eldru kunnu fáa bæði fleiri og longri vitjanir. Her eigur at verða gjørdur ein miðvísur innsatsur, so vit tryggja okkara eldru tey rímiligu kor, vit einki minni enn skylda teimum!

Eg vil sum løgtingsmaður vísa í verki, at eg meini tað í fullasta álvara, tá eg sigi, at eldraøkið er mítt fremsta hjartamál, og eg vil – á sama hátt sum gjøgnum býráðsarbeiðið – gera mítt ítarasta fyri, at vit skulu røkka tí fremsta og mest upplagda málinum: At skapa okkara eldru betri umstøður.

Vit skylda teimum, at meira ferð kemur á, so tey og teirra ikki skulu liva síni síðstu ár í stúran, tí tey ikki hava eitt trygt og gott heim og onkran, sum sær til tey. Her má landið traðka til og ganga undan, tí so leingi eldraøkið er ein landsuppgáva, skal hon loysast av landinum. Og tað ongantíð ov skjótt!

# Barnsburðarfarloyvið má longjast



Val X
TÓRI HØJGAARD
Formaður, UfM
Valevni Miðflokksins

**Føroyar hevur - við einum hálvum ári - stytsta barnsburðarfarloyvið í norðanlondum. Miðflokkurin hevur sum mál at longja barnsburðarfarloyvið upp í eitt heilt ár**

Flestu tilmælini frá serfrøðingum hesi seinastu árini hava greitt boða frá, at eitt smábarn hevur tað best, um tað í mest møguligan mun verður ansa av foreldrunum fyrsta liviárið.

Tí hevur Miðflokkurin sum eitt av sínum høvuðsmálum á familjupolitiska økinum at longja barnsburðarfarloyvi úr 6 mðr upp í 12 mðr. At tað væl letur seg gera, sóu vit herfyri, tá ið Bjarni Djurholm landsstýrismaður í vinnumálum boðaði frá, at inngjaldið í barsilsskipanina fór at lækka, tí at ov nógvur peningur kom inn. Heldur enn at lækka inngjaldið áttu stig at verði tikin til, at tilmælini vóru fylgd, og føroysk børn kundu verað verandi heima tað fyrsta liviárið.

Sæð úr javnstøðu sjónarhorninum eigur skipanin eisini at verða broytt soleiðis, at tað er gjørligt hjá pápunum at vera heima meir enn teir fjúrtan dagarnar, ið teirra barnsburðarfarloyvið er í dag. Sjálvt um tað er givið, at í flestu førum hevði mamman verið heima størsta partin av farloyvinum, so átti landið í veruleikanum als ikki at blanda seg uppí, hvør var heima hjá barninum. Samlaða farloyvið átti at veri eitt ár, og síðani kundu foreldurini sjálvi avgjørt, hvussu tey býttu hetta sínamillum.

At ein kvinna kann væntast at fáa børn innan fá ár kann ofta virka sum eitt handikapp í arbeiðslívinum. Størri frælsi at samskipa barnsburðarfarloyvið við makan hjá sær hevði uttan iva gjørt arbeiðslívið lættari hjá nógvum kvinnum.

Hesum málum fari eg at arbeiða fyri, um eg verið valdur á ting 19 jan.

# Trygg vælferð og skilagóð búskaparstýring



Val X
EDVA JACOBSEN
Sambandsflokkurin

Við einum sterkum búskapi og í góðum felagsskapi við Danmark, tryggja vit vælferðina í tí Føroyska samfelagnum.

Sambandsflokkurin er kendur fyri at hava skilagóða búskaparstýring.

Sterkur búskapur er við til at økja um vælferðina. Búskaparliga er tað av stórum týðningi at leggja til síðis í góðum tíðum, fyri framhaldandi at tryggja vælferð hjá okkum og okkara børnum.

Av tí at okkara høðusvinna er sera følsom fyri broytingum í samfelagnum, soleiðis at inntøkurnar kunnu minka nógv yvir stutta tíð, er tað sera trygt av vera í Ríkisfelagsskapi við Danmark.Tað er við til at styrkja okkara búskap vegna blokkin, sum verður latin okkum. Hetta ger, at vit eisini í niðurgangstíðum kunn raðfesta tey bleytu virðini høgt.

Fyri okkum í sambandsflokkinum er vælferðarsamfelagið og tað persónliga frælsið hjá tí einstaka meira virðismikið enn natioanalistiskar hugsjónir, og flokkurin fer tí ongantíð at seta vælferðina upp á spæl fyri at gera Føroyar meira sjálvgjargnar. Einki skal gerðast í óðum verkum, men flokkurin hevur tað mál, at vit í Føroyum skulu hava sama livistøði sum hini norðurlondini hava.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur sum meldar púra greitt út at vit ynskja at varðveita og menna ríkisfelagsskapin. Vit hyggja úteftir, og hesin felagsskapur er lykilin út í heim.

**Vel tað trygga, vel vælferð, seti X við lista B**

# Hvat hava tey eldru at síggja framm ímóti?



Val X
ELSEBETH GUNNLEYGSDÓTTUR HANSEN
Valevni Fólkafloksins

Eitt av teimum evnum eg nevndi í seinastu grein míni, var eldraøkið og hetta vil eg nú lýsa nærri.

Aftaná at ein er vorðin eldri og ikki hevur somu orku til at arbeiða meira, verður dagligdagurin fullkomiliga broyttur. Aldurdómur kemur sjáldan einsamallur, eitt nú fylgja ymisk aldursbrek eisini við.

Alt hevur jú tíð sína og spurningurin er tí, hvat tey eldru hava at síggja fram ímóti aftaná eitt langt og mangan krevjandi lív. Hesi fólk hava eitt ótal av lívsroyndum og kunnu læra okkum yngru nógv. Tey hava framhaldandi uppiborið eitt virðiligt og innihaldsríkt lív. Her er tað skylda okkara sum borgarar at hjálpa hvørjum øðrum tá vit gerast eldri.

Vit mugu skipa eldraøkið soleiðis, at tørvurin hjá tí einstaka verður gingin á møti, havandi í huga, at tað er sera ymiskt hvussu fólk eldast. Summi hava tørv á friði, har onnur framhaldandi ynskja at taka lut í samfelagnum. Tískil hevur tað eisini stóran týdning, at starvsfólk í eldraøkinum altíð eru fakliga væl fyri.

Frá politiskari síðu krevur hetta bæði forstáilsi og at peningur verður settur av til at tryggja hóskandi karmar til tey eldru.



Val X
MAJ-BRITT JACOBSEN
Sambandsflokkurin

# Vit Lesandi

Nógv hevur verið tosað um vælferð og tey bleytu virðini - hvussu vit skulu styrkjast og mennast á hesum økinum.

Men visti tú at studningurin lesandi frá í Føroyum er meira enn 1200 krónur minni um mánaðin enn í Danmark? Og har afturat fáa lesandi í Danmark Føroyafrádrátt og einligar mammur fáa tvífaldaðan studning. Hetta skulu vit gera nakað við!!! Sjálvandi skal studningurin í Føroyum samsvara við tann danska, soleiðis at tað eru betur møguleikar hjá teimum lesandi her heima.

Tað skal eisini verða møguligt og liviligt hjá einligum mammum at lesa í Føroyum, so tær ikki framhaldandi skulu tvingast av landinum....

Og ikki at gloyma studentarskúlan, sum stendur sum ein ruin - hetta er skomm fyri okkara land.

Hetta er tað eg vil arbeiða fyri at fáa í rættlag í Føroyum.

Gott Val

**X við lista B**